# Preben Hansen 60 ár



26. juli verður Preben Hansen 60 ár. Preben er dani – føddur og uppvaksin í Keypmannahavn – men hevur nú búð meira enn helmingin av lívi sínum í Føroyum. Foreldur hansara vóru Svea Majken Hansen (ættað úr Svøríki) og Edwin Ove Hansen. Umframt Preben fingu foreldrini eisini Karinu, ið er 2 ár eldri.

Eftir at Preben var blivin tekniskur assistentur fór hann at lesa verkfrøði í Horsens. Har leyk hann prógv í 1970 við framúr góðum úrsliti. Eftir hetta starvaðist hann hjá Momberg & Thorsen frá 70 til 72.

Momberg & Thorsen var partur av Danish Arctic Contractors, og í hesum sambandi fór Preben í mai 1972 til Marmorilik í Grønlandi at arbeiða. Eftir at hava starvast í Grønlandi í 8 mánaðar helt hann fram í starvi hjá Momberg & Thorsen í Danmark.

Í Danmark hitti Preben havnagentuna Ernu Háberg og giftust tey í mai 1974.

Tey fluttu til Føroya í juli 1975 og starvaðist Preben at byrja við hjá Lamhauge & Waagstein.

Seinastu 24 árini hevur Preben kortini rikið egið ráðgevingarvirki og hevur hann sum ráðgevi verið við til at framt nógvar stórar verkætlanir. Ein av teimum stóru í nýggjari tíð er havnin í Ánunum, sum Klaksvíkar kommuna hevur gjørt.

Í 2000 varð Preben við til at stovna kristnu útvarpsstøðina Lindina. Preben hevur verið ein eldsál í hesum arbeiði. Hann hevur verið nevndarlimur og virkað sum leiðari øll hesi árini.

Erna og Preben eiga børnini Høgna og Maiken, umframt ommu- og abbadóttrina Rúnu.

Føðingardagin heldur Preben í "móðurlandi" sínum Svøríki, har systurin Karina eisini er búsitandi.

# Finnur Johannessen 65 ár



Týsdagin 25 juli verður Finnur Johannessen 65 ár.

Finnur er føddur og uppvaksin í Skopun. Sonur Elli og Kinnu úr Skopun. Tey eru fýra systkin Birgit, Erling, Bergtóra og Finnur.

Finnur er útbúgvin málari og hevur starvast víða í norðanlondum, men best trívist hann á skúlavegnum við penslinum og góða gamla Fiatinum.

Vit systkin við børnum og familju takka fyri alt tú er fyri okkum og ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum, við ynskjum um alt gott í komandi tíð.

**Vinarliga vit í Skopun, Norra og Danmark**

## Krúndiamantbrúdleyp

Hósdagin 27. juli hava **Noomi og Hans Petur Øregaard** á Frederiksberg krúndiamantbrúdleyp. Tey eru ikki við hús. Dagurin verður hildin saman við næstu familjuni.

**Dagurin í morgin**

**27. juli. Marta**
Eitt av systkinunum í Betániu; hon sum gjørdi sær stríð og ónáðir av mongum. Halgisøgan sigur, at Marta saman við systkinum sínum fór til Marseille í Fraklandi, har hon stovnaði eitt kleystur, sum hon livdi í í 30 ár. Aramáiskt navn, sum merkir húsfrúgv.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Kathrina (Káta) Mortensen**
**Klaksvík**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum sum vóru um hana hennara síðstu tíð, eisini vilja vit takka fyri troystarík orð í kapellinum, í Betesta og á grøvini.

Børnini við familjum

†

## Andlát og jarðarferðir

**Sunneva Thomassen, fødd Gøthe**, ættað úr Norðagøtu, búsitandi í **Klaksvík**, andaðist týsdagin 25. juli, 88 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum hósdagin kl. 18.00 í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður Christianskirkjuni fríggjadagin kl. 13.30

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

†

Tað verður kunngjørt fyri ætt og vinum, at okkara góða mamma, omma og langomma

**Sunneva Thomassen**

f. Gøhte - ættað úr Norðagøtu
búsitandi í Klaksvík

andaðist 25. juli 88 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum 27. juli kl. 18.00.
Jarðarferðin verður fríggjadagin 28. juli
kl. 13.30 úr Kristianskirkjuni.

*Familjunnar vegna*
**Ørvur, Einar, Kjartan og Marianna**

†

## Andlát

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara kæra mamma og omma

**Sofía Hansen f. Kristiansen á Eiði**
**(vanliga nevnd Fía, kona Olivur Hansen)**

andaðist leygardagin 22. juli, 94 ára gomul.
Jarðarferðin verður frá Nykøbing S. Kirke
leygardagin 29. juli kl. 13.

Vegna tey avvarandi

**Kathrina og Kári**